Høgni Hoydal
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um koppsetingarætlan fyri koronu, settur landsstýrismanninum við heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvussu er raðfestingin gjørd fyri at koppseta fólk fyri koronu – t.e. hevur landsstýrið saman við føroyskum fakfólki viðgjørt og gjørt eina raðfesting við støði í føroyska samfelagnum, ella er talan um einvíst at fylgja vegleiðingunum frá donskum myndugleikum?

2. Hvussu er grundgivið og ásett, hvørji fólk eru í serligum vandabólki, og hvussu er tíðarætlanin fyri ymsu bólkarnar – herundir kroniskt sjúk, fólk ið bera brek og fjølbrek, fólk ið eru og skulu undir viðgerð uttanlands og avvarðandi hjá hesum bólkum v.m.?

3. Eru atlit tikin til fólk, har vantandi samband við onnur hevur serligar sálarligar og kropsligar avleiðingar?

4. Hvussu er raðfestingin viðgjørd og ásett fyri at koppseta fólk í serliga "samfelagskritiskum" størvum í samfelagnum, og hvussu er tíðarætlanin fyri hesar bólkarnar – heruppií tey, ið starvast við fólki í vandabólki, fólk í tilbúgving og el-framleiðslu, fólk í strandferðslu og flogvinnu, útisiglarar, fólk við kassarnar í handlum, hýruvognsførarar v.m.?

5. Hevur landsstýrið gjørt nakra roynd at samskifta við og kunna Løgtingið um koppsetingarætlanirnar?

6. Hví hevur landsstýrið ikki viðgjørt koppsetingarætlanina og gjaldið fyri koppsetingar á Løgtingi?

Viðmerkingar:
Talan er um sera týðandi og stórar avgerðir fyri fólkið og landið í bardaganum móti koronufarsóttini. Og fólk, fakfólk og politiskir flokkar hava lagt nógv fyri at standa saman og taka felags tøk undir koronufarsóttini. Tað er uttan iva høvuðsorsøkin til, at Føroyar hava megnað støðuna so væl higartil.

Tí er undranarvert, at koppsetingarætlan ikki er viðgjørd í politisku skipanini, at fíggingin og gjaldið ikki eru løgd fyri Løgtingið, og at landsstýrið ikki hevur lagt fram raðfestingarnar og grundgevingarnar fyri raðfestingunum í koppsetingarætlanini. Tað tykist sum, at koppsetingin fer fram við støði í danska samfelagnum og donskum avgerðum og við donskum pengum.

Á Løgtingi, 17. februar 2021

Høgni Hoydal